

*Fyrrv. "Stjørnan" við føroyskari manning:*

# Vaktarskip á oljufeltinum

*Fyrsta skipið í føroyska flotanum , sum er farið upp í frálandavinnuna, er fyrrverandi Stjørnan. Skipið røkir vaktartænastu á Heidrunfeltinum á norska landgrunninum*




Í farnu viku fór Veahav, sum er fyrrverandi skittfiskabáturin Stjørnan av Havnini við kós móti stóra norska oljufeltinum "Heidrun" út fyri Miðnoreg.

Skipið hevur júst verið á Tórshavnar Skipasmiðju til árligt eftirlit.

Men hvat er tað so áhugavert við hesum skipi kundi verið spurt?

Hetta fyrrverandi føroyska fiskiskipið, sum varð bygt á Skála Skipasmiðju, er í dag einasta skipið, skrásett í Føroyum, sum arbeiðir í oljuvinnuni. Skipið er í vaktartænastu hjá oljufelagnum CONOCO í Heidrun økinum uttan fyri Trondheim í Noregi.

Skipið hevur føroyskt flagg og føroyska manning.

Tað var í 1993, at norðmenn og danir stovnaðu felag í Føroyum við tí fyri eygað at keypa upp skip til at arbeiða í oljuvinnuni.

Partafelagið fekk navnið Scombus 1 og vórðu settar 900.000 kr. í partapeningi.

Felagið keypti fyrrverandi Stjørnina á tvingulssølu, eftir at hon hevði ligið á Vestmanna í trý ár. Skipið varð keypt fyri 70.000 kr. og varð beinanvegin umvælt og gjørt út til at kunna arbeiða sum vaktarskip í supplyvinnuni. Alt hetta arbeiði varð gjørt á Tórshavnar Skipasmiðju.

Í dag stendur skipið í 1,7 mill. kr. Tað hevur longu arbeitt sum vaktarskip í eitt ár. Tað fór úr Føroyum í mai mánað í fjør.

Í frálandavinnuni er talan um tríggjar ymsar uppgávur hjá skipum. Tað er standby-, supply- og vaktartænasta. Við vaktartænastu skilst, at skipið skal liggja við ein boripall og ansa eftir, at onnur skip ikki koma í nánd, sum kunnu órógva.

Sosialurin hevur skilt, at tað í lotuni verður leitað eftir einum skipi afturat í Føroyum til vaktartænastu í oljuvinnuni.

Við Veahav eru 5 føroyingar.

**jan**

## Framsýning av handaligum arbeiði á Húsarhaldsskúla Føroya í dag

Várskeiðið á Húsarhaldsskúla Føroya í Klaksvík er um at vera liðugt. Og í dag verður so framsýning av tí handaliga arbeiðinum, sum næmingarnir hava arbeitt við teir seinastu 5 mánaðirnar.

Teir 12 næmingarnir, sum hava gingið á hesum skeiðnum, hava gjørt nógv ymiskt handarbeiði so sum seyming, brodering, silkimaling, perluseyming, binding, knyting, føroysk bond og annað.

Framsýningin verður opin í dag frá kl. 16 til 21. Øll eru vælkomin inn á gólvið. Í sambandi við framsýningina er eisini høvi at fáa kaffi og rísálamande.

Áhugin fyri at koma á Húsarhaldsskúla er sera stórur. Pláss er fyri 20 næmingum á skúlanum. Várskeiðið endar fríggjadagin 2. juni. Nýtt skeið byrjar aftur 7. aug.


...nú er tíð at gleða seg, tí summarið nærkast í hvørjum



Bílegg pláss nú!

Smyril Line bjóðar nú:

EINVEGIS BILPAKKAR

- og harvið øktar møguleikar at samanseta út- og heimferðina eftir egnum ynski.

Bilpakkatilboð okkara eru galdandi teir við Ⓑ merktu fráfaringardagarnar í ferðaætlan okkara.

4 fólk v/bili

| | | |
|---|---|---|
| NOREG úr kr. | L: 2.125:- | H: 2.860:- |
| DANMARK úr kr. | L: 3.090:- | H: 4.220:- |
| ÍSLAND úr kr. | L: 2.780:- | H: 3.795:- |
| DANMARK um BERGEN úr kr. | L: 2.860:- | H: 4.010:- |

Bátaferðir

Við egnum báti í norska skergarðinum

4 fólk v/báti aftur og fram

| | | |
|---|---|---|
| BÁTAFERÐ úr kr. | L: 6.360:- | H: 8.360:- |

L: = Lágárstíð: H: = Háárstíð:

*Ring og hoyr meira!*

J.Broncksgøta 37

SMYRIL LINE

Tlf. 15900